ítróttur

Nr. 147 • fríggjadagur • 6. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | mál | vunnin mál | tapt munur | mál-stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 10 | 7 | - | 2 | - | 1 | 26 | 10 | 16 | 23 |
| 2 B36 | 10 | 5 | - | 3 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 18 |
| 3 Skála | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 21 | 14 | 7 | 17 |
| 4 VB | 10 | 4 | - | 4 | - | 2 | 16 | 11 | 5 | 16 |
| 5 NSÍ | 10 | 4 | - | 3 | - | 3 | 15 | 14 | 1 | 15 |
| 6 EB/Streymur | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 17 | 15 | 2 | 14 |
| 7 GÍ | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 15 | 20 | -5 | 14 |
| 8 KÍ | 10 | 2 | - | 7 | - | 1 | 16 | 12 | 4 | 13 |
| 9 ÍF | 10 | 1 | - | 1 | - | 8 | 14 | 34 | -20 | 4 |
| 10 B68 | 10 | 0 | - | 2 | - | 8 | 7 | 26 | -19 | 2 |

# Alt talar fyri endurtøku frá í fjør

**Havnarfeløgini tykjast skula verða einsamøll í kappingini um fremstu plássini, og tað skal ganga rættuliga illa hjá HB, um teir ikki fyri triðju ferð skulu vinna FM triðja árið á rað**

SAMANUM 10. UMFARIÐ

*Jóannes Hansen*



*Jan Dam var ein brandur í HB-verjuni mikukvøldið, tá ið HB við einum 4-1 sigri á Jonhard Frederiksberg og Skála styrkti um oddasessin hjá sær, so at teir nú eru fimm stig framman fyri B36 á næstfremsta plássinum*

*mynd: Maria Olsen*

So fekst endi á tíggjunda leikumfarinum. Í Føroyum er tað ikki vanligt, at tað verður spælt eitt umfar í tríggjar dagar. Í eitt nú Íslandi, Svøríki og eisini Noregi kemur hetta ofta fyri. Hjá illa mannaðu føroysku bløðunum bilar hetta einki, og tað hevði kanska verið eitt hugskot at viðgjørt, um kappingin skal skipast soleiðis. Í ár verður meiri gjørt burturúr fleiri leikdøgum, enn tað hevur verið gjørt undanfarnu árini. Eitt nú skal ÍF spæla í Runavík næsta mánakvøld.

At tað verður spælt mitt í viku hevur eisini sínar keðiligu síður. Eitt nú mistu NSÍ spælararnir ein og ein hálvan arbeiðsdag, tá ið teir mikukvøldið vóru í Vági. Teir fóru suður seinnapartin mikudagin, og teir vóru við hús aftur fyrrapartin í gjár. At missa so nógva arbeiðstíð er nógv hjá monnum, sum frammanundan brúka frítíðina til fótbóltin. Tað vita eisini teir í Vági alt um.

Úrslitini hesa ferð staðfestu, at tað enn eina ferð eru havnarfeløgini, sum eru fremst í FM kappingini. HB er oddalið, og B36 er næstfremst. Fimm stig eru á muni teirra millum. HB hevur vunnið tríggjar tær seinastu ferðirnar, og teir hava ikki tapt, síðani teir í fyrsta umfarinum vóru á Skála. HB og B36 skulu spæla í fimtanda umfarinum, sum er á skránni 12. september. Um tað gongst, sum tað hevur gjørt síðstu tíðina, so kann møguleikin ikki útihýsast, at tað við HB sigri í grannastríðnum longu tá verður neyðugt at fara langt út í teoriina fyri at finna annan møguleika fyri meistara enn HB.

Havnar Bóltfelag stendur eftir trivaliga sigurin á Skála til at vinna triðja FM heitið á rað. Tvær ferðir áður hevur HB verið meistari tríggjar ferðir upp í slag. Fyrra ferðin var í 1963, 1964 og í 1965, og seinna ferðin var í 1973, 1974 og í 1975.

### Fyrireikingarnar

HB tykist á so mangan hátt at vera best fyri. Teir tykjast hava fleiri skikkaðar spælarar, enn hini liðini hava. Um ein ella tveir sita skaddir ella leikbannaðir uttanfyri, so eru nýggir at seta í teirra stað. Tað er galdandi bæði aftarlaga og frammarlaga á vøllinum. Blandingin millum ungar og eldri, og teir, sum eru uppvaksnir í felagnum, og teir, sum eru komnir aðra staðni fra, tykist vera perfekt.

Harafturat tykist HB í løtuni at vera betri fyri at spæla bólt, enn hini feløgini eru tað. Meðan tað hjá hinum er neyðugt at spæla seg í form, so hevur HB dystarvenjingina. Teir hava fyri stuttum spælt tvær ferðir í Europa Cup, og fyri viku síðani spældu teir steypafinaluna.

Skála, sum mikukvøldið misti nógv í oddastríðnum, hevur ikki verið í týdningarmiklari uppgerð síðani 27. juni. Tað sigur seg sjálvt, at dystarvenjingin hjá teimum er ikki tann sama, sum hon er hjá HB. Vandin hjá oddaliðnum er kanska, at spælararnir fara at møðast skjótari enn hinir, tá ið teir ikki hava verið í summarfrí. Men kappingin er ikki so long, og tað er ivaleyst eyka íblástur, tá ið FM heitið er í eygsjón.

Skála hevur nú tapt tríggjar landskappingardystir á rað. Fyrst taptu teir ímóti NSÍ, og síðani hava teir tapt ímóti EB/Streymi og HB. Eingin ivi er um, at tað nívir nógv meiri hjá Skála, enn tað ger hjá eitt nú HB, tá ið spælarar ikki eru førir fyri at spæla. Mikukvøldið var Iulian Floresco burtur, og Pauli G. Hansen noyddist at taka seg aftur. Tað gjørdi stóran mun.

Um B36 skal gera nakað við HB, so mugu teir vinna hvørja ferð. Týskvøldið vóru teir á Eiði, har tað er synd at siga, at mótstøðuliðið var væl fyri. Sambært tí, sum var at frætta undan uppgerðini, so hava teir í EB/Streymi verið á frítíðarferð og ikki á venjingarlegu í Italia, og teir høvdu vant tríggjar ferðir, síðani teir komu aftur á Mølina. Munurin á fyrireikingunum hjá teimum og HB er kanska størri, enn hann man vera millum yrkisfeløg í Europa og eitt nú HB.

### Fleiri fella frá

Í fyrstu atløgu tykist stóra stríðið standa um triðja plássið. Í tí kappingini misti NSÍ týdningarmikil stig mikukvøldið, meðan VB lyfti sær á. Um vágbingar megna at vinna á Skála í ellinta umfarinum, so verður munurin teirra millum lítil og eingin. NSÍ hevur nú tapt tríggjar týdningarmiklar dystir á rað. Fyrst taptu teir ímóti HB í landskappingini, so taptu teir steypafinaluna, og nú taptu teir í Vági.

Gøtumenn fáa sunnudagin vitjan av B68, og klaksvíkingar skulu royna seg á heimavølli ímóti B36. Hjá ÍF, sum skal til Runavíkar, og hjá B68 verður talan um kapprenning fyri at halda seg burtur frá aftasta plássinum. Felags fyri bæði liðini er, at tað næstu dagarnar verður roynt at finna út av, hvussu stórur fongurin er í fremmandu monnunum, sum eru komnir til Fuglafirðar og Toftir.

Hjá KÍ hevur higartil verið talan um óeydnisár. Teir hava bara tapt eina ferð, men sjey javnleikir bera ikki langt. At dysturin millum B68 og KÍ varð spældur týskvøldið var púra við síðuna av. Feløgini og áskoðararnir vórðu snýtt. Í Føroyum er veðrið óstøðugt. Tá ið tað eina løtu hevur verið mjørki, er sannlíkið minni fyri mjørka næstu dagarnar. Mikukvøldið var dýrd á Toftum, sum tað var tað alla aðra staðni kring landið. Tá hevði verið lag á manni at spælt fótbólt. Kanska eigur FSF at umhugsa nágreiniligari reglur fyri dómararnar, tá ið spurningurin um avlýsingar og útsetingar skal handfarast.



# Nýtt ættarlið setur dagsskránna í Vági

**Men Mindaugas og Bjarni Johansen vóru høvuðsleikararnir og stóri munurin, tá ið NSÍ enn eina ferð noyddist at lúta í týdningarmiklum dysti**

VB-NSÍ

*Jóannes Hansen*



*Bjarni Johansen var ein sannur brandur í málinum hjá vágbingum, tá ið teir mikukvøldið vunnu 3-1 á NSÍ vesturi á Eiðinum*

*savnsmynd*

Náttúru karmurin á Vágseiði er sum onga aðra staðni, har fótbólur verður spældur. Kanska mótmæla teir á Mølini á Eiði av røttum, men annars kemur eingin í nánd av Vágseiði, har undirlagið nú eisini ber góðar møguleikar fyri fótbóltsspæli við sær.

Mikukvøldið var dýrdarveður, tá ið vágbingar settu trý stig afturat á kontina og harvið tóku stórt fet rætta vegin.

Merkisvert var tað, at heimasigurin varð vunnin við fleiri nýggjum spælarum á liðnum. Evnini hava verið eyðsýnd, men higartil hava fleiri teirra ikki verið fastir menn. Hesa ferð var pláss í verjuni fyri Kára í Lágabø og á miðvøllinum fyri Poul N. Poulsen, og John Poulsen varð settur á vøllin fyri Palla Augustinussen, sum saman við Mortan úr Hørg telist millum stuðulsspælararnar.

Men tað vóru tveir, sum í sólini skinu meiri enn allir hinir. Mindaugas er ein framúr álopsspælari, og tað staðfesti hann enn eina ferð. Bjarni Johansen hevur verið VB hentur í sekstan ár. At hann framvegis er ein meistari millum stólparnar, varð enn eina ferð undirstrika. Hann hevði einar fýra heilt framúr bjargingar. Eitt nú fepur bjargaði hann, sum tað plagar at verða tikið til, tá ið Andy Olsen, sum mundi vera ein tann eyðsýndasti í annars tannleysa NSÍ álopinum, royndi seg við stútara úr fimm metrum.

### Málini

Dan Djurhuus, sum miðskeiðis í 2. hálvleiki tiltuskaði sær púra óneyðugt reytt kort, setti hol á, tá ið stórt korter var farið. Mortan úr Hørg legði innfyri úr høgru og aftur um handara stólpan, og úr stórari fjarstøðu stútaði álopsmaðurin í bleytum boga í handara síðu.

Ferðin var stór, og møguleikarnir vóru nógvir. Men einki mál kom afturat í 1. hálvleiki. Eftir steðgin økti Mindaugas bæði til 2-0 og 3-0, og í báðum førunum átti hann sjálvur nógv størsta partin av avrikinum. Í fyrra førinum spældu Mortan úr Hørg og Palli Augustinussen skjótt fram í høgru, og hóast hann hevði tríggjar álopsspælarar kring seg megnaði Mindaugas at sneiða seg leysan og skjóta mál. Í seinna førinum var finkulin í høgru rættuliga spískur, men kortini megnaði vandamikli maðurin at gera seg leysan og at skjóta mál.

Fyri VB var tað sera týdningarmikið, at teir øktu til 3-0. Stutt frammanundan var Dan Djurhuus útvístur. NSÍ legði ógvusligt trýst á síðsta hálva tíman, men teir fingu bara eitt mál. Tað skoraði Ian Højgaard, eftir at Helgi L. Petersen, sum hesa ferð var miðframherji hevði roynt seg, og Bjarni Johansen hevði hálvbjargað.

NSÍ royndi og royndi, og teir spældu væl úti á vøllinum. Men frammanfyri málið vóru teir sørir, og tá ið tað endiliga eydnaðist, so var Bjarni Johansen meistarin.

VB–NSÍ 3–1 (1–0)  
1–0: Dan Djurhuus 18.  
2–0: Mindaugas 63.  
3–0: Mindaugas 73.  
3–1: Ian Højgard 74.  
Dómari: Birgir Sondum  
VB: Bjarni Johansen – Mortan úr Hørg, Eyðun Jacobsen, Anders Nielsen, Kári í Lágabø – Palli Augustinussen (John Poulsen, 85.), Poul N. Poulsen, Milan Kuljic, Símun Samuelsen (Jón Pauli Olsen, 60.) – Mindaugas, Dan Djurhuus  
Gult kort: Mortan úr Hørg, Poul N. Poulsen  
Reytt kort: Dan Djurhuus 65.  
NSÍ: Jákup Emil Hansen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen (Eddie Mikkelsen, 83.) – Gert Langgaard (Áki L. Hansen, 79.), Kári Hansen, Ian Højgaard – Andy Olsen, Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen  
Gult kort: Kári Hansen, Alexander Jovevic

# Alt ov lítið hvassir

**NSÍ venjarin staðfestir, at stóra orsøkin til, at úrtøkan nú fleiri ferðir hevur verið soltin, er, at teir hava alt ov lítla tyngd í álopspartinum**

VB-NSÍ

*Jóannes Hansen*

Tað hevur ikki hilnast væl hjá NSÍ nógvu tær síðstu ferðirnar. Teir hava tapt tríggjar av teimum fýra seinastu týdningarmiklu dystunum. Einasta undantakið var sigurin í hálvfinaluni í steypakappingini á Varmakeldustevnu.

NSÍ venjarin, Jógvan Martin Olsen, ivast ikki í, hvat tað er, sum er orsøkin til soltnu úrtøkuna:

– Vit fáa alt ov lítið burturúr. Hesa ferð høvdu vit nógvar stórar málmøguleikar. Fleiri ferðir vóru við í yvirtalsstøðum. Spæl-ararnir tykjast taka skeivar avgerðir. Tá ið tað er upplagt, at teir spæla leysar viðspælarar, velja teir heldur at royna úti frá, og viðhvørt er tað hinvegin. Bjarni Johansen stóð seg ógvuliga væl, men vit mugu eisini taka á okkara kappa, at vit ikki fáa størri úrtøku.

– Hjá VB er Mindaugas ein framúr álopsspælari. Um vit høvdu havt ein av hansara slagi í okkara parti mikukvøldið, so ivist eg ikki í, at vit høvdu skorað fleiri mál. Men tað hava vit ikki, og so fæst ikki úrtøka, hóast uppspælið er gott, staðfestir Jógvan Martin Olsen.

Ímóti ÍF á heimavølli mánakvøldið fer NSÍ aftur at hava Jens Martin Knudsen millum stólparnar.

# VB ætlar sær longri upp

**Málverjin heldur, at venjingarlegan í Danmark fer at vísa seg at hava verið rættuliga týdningarmikil**

VB-NSÍ

*Jóannes Hansen*

Tað var gott lag í VB legguni, eftir at tað í góðveðrinum mikukvøldið hevði eydnast at bast NSÍ. Merkisvert var tað, at onkrir av spælarunum, sum higartil hava spælt nógv, ikki vóru á liðnum. Eitt nú var Birgir Jørgensen als ikki á liðnum. Hann sigst ikki hava tíð at spæla fótbólt júst nú, og Jón Pauli Olsen, sum ikki var við á venjingarleguni í Danmark, spældi bara síðsta hálva tíman.

VB hevur seinnu árini havt góð dreingjalið og unglingalið, og tað sæst nú aftur á besta liðnum, har nýggir spælarar bjóða seg fram.

Bjarni Johansen, sum var brandur í málinum, heldur, at tað er komið væl við hjá teimum, at teir vóru á venjingarlegu í Danmark, og hann avskrivar avgjørt ikki møguleikan fyri heiðursmerkjum:

– Vit skulu spæla á Skála sunnudagin, og vit fara eftir øllum stigunum. Vit hava alt ár mett okkum at hava manning til at vera við í toppinum, men tað hevur nakrar ferðir ikki verið nóg gott. Eitt nú kom tað illa við, at vit á Jóansøku taptu ímóti GÍ.

